# Vit skulu skilja umhvørvið betur

**Føroyskir granskarar og altjóða hav- og umvørvisserfrøðingar sita í løtuni á námsskeiði í Havn fyri betur at skilja alla vistskipanina kring Føroyar. Úrslitið av arbeiðinum skal kunna gagna bæði fiskivinnu og oljuvinnu og myndugleikum**



*Bogi Hansen, havfrøðingur helt fyrilestur um havið kring oyggjarnar. Mynd Jens K Vang.*

HAVIÐ OG GRANSKING
*Jan Müller*

Í hesum døgum verrður eitt sera áhugavert og týdningarmikið námsskeið »workshop« um havumhvørvið kring Føroyar hildið í Havn við luttøku av nøkrum av teimum fremstu granskarunum í heiminum. Heitið er »Workshop on Ecosystem Modelling of Faroese Waters«.

Námsskeiðið varð sett á sjómansskúlanum í gjár og heldur fram í dag og hósdagin við fyrilestrum og orðaskifti.

Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni setti tiltakið, sum verður fíggjað av FOIB, ið er áhugafelagið hjá oljufeløgunum, ið eru við í leitingini á landgrunninum.

Hjalti í Jákupsstovu er sera fegin um, at hetta námsskeiðið er vorðið til veruleika og at tað hevur eydnast at fáa fleiri framstandandi granskarar henda vegin, sigur við Sosialin, at ætlanin er, at føroysku granskararnir saman við útlendsku serfrøðingunum, skulu royna at gera ein vegleiðing til, hvussu man byggir ein frimil, modell upp um, hvussu umhvørvið ávirkar framleiðsluna av fiski og lívfrøði og fiskiskapin undir Føroyum.

Í mong ár hevur Fiskirannsóknarstovan útvegað data og upplýsingar um havumhvørvið við Føroyar og kom eisini meiri gongd á hetta arbeiðið, tá oljufeløgini fóru at vísa áhuga fyri okkara landgrunni. Hjalti í Jákupsstovu sigur, at man hevur roynt at fáa oljufeløgini at skilja, at tað mest týdningarmikla við slíkum kanningum er at skilja alla skipanina heldur enn bara at hyggja eftir nøkrum serstøkum viðurskiftum fyri seg.

Endamálið við námsskeiðinum er tí at finna út av, hvar man kann seta inn við meiri gransking fyri at skilja alt havumhvørvið betur, eitt nú hvussu streymur og vindur ávirka framleiðsluna av æti og fiski. Og her koma bæði fiskivinna og oljuvinna inn í myndina.

– Alt hetta verður gjørt fyri at skilja, hvussu tann føroyska vistskipanin (økoskipan) virkar og við tí vitanini betur at kunna ráðgeva eitt nú oljufeløgum í teirra virksemi og myndugleikunum í stýring av fiskiskapinum.

Sjálvur hevur stjórin á Fiskirannsóknarstovuni stórar vónir til tað arbeiðið, sum er í gongd og til tað, sum henda workshoppin kann hava við sær. – Hetta hevur stóran týdning. Vit fáa ment okkara arbeiði, vit fáa íblástur og vegleiðing til tað, sum vit víðari skulu gera. Vit kunnu við hesum tiltaki hyggja nærri at, hvussu tingini hanga saman og víðari hvussu man matematiskt kann modelera.

At oljufeløgini hava fíggjað námsskeiðið heldur Hjalti vera bæði skilagott, tí oljuvinnan eigur eisini at vera við til at skilja, hvussu havið virkar rundan um Føroyar, soleiðis at hon verður betri før fyri at taka støðu til, hvussu ein møgulig ávirkan frá oljuvinnuni ávirkar skipanina.

*– Nú er so nógv kannað og vit hava livað av havinum so leingi. Kenna vit ikki havið og umhvørvið til lítar ella hava vit tørv á at vita nógv meira?*

– Vit hava brúk fyri at vita, hvussu tingini hanga saman fyri at kunna siga nakað um útlitini. Summi ár er nógvur gróður, onnur ár minni – hví er tað so?

## Ráðgeving um fiskastovnar

Hjálti í Jákupsstovu váttar, at hetta eisini hevur stóran týdning fyri ta ráðgeving og tey tilmæli, sum fiskifrøðingar skulu koma við til politikararnar í framtíðini.

– Havumhvørvið ella øll vistskipanin kring Føroyar er ein sera komplex skipan og hava vit brúk fyri at skilja hana betri. Tað vil so aftur geva okkum eitt amboð til at troyta hana skilabest og fyri eina nýggja vinnu sum oljuvinnuna vil eitt betri forstáilsi av samspælinum í náttúruni við Føroyar eisini vera sera hent.

Hjalti í Jákupsstovu ivast ikki í, at eisini onnur øki í heiminum kunnu fáa stórt gagn av tí gransking, sum vit gera í Føroyum, tí her hevur tú eitt avmarkað og lítið øki, sum tað ber til at kanna, um ikki 100% men so kortini út í æsir. Miðjað verður tí eisini móti at fáa útlendskar granskarar og fremstu serfrøðingar á økinum við í arbeiðið, ið tá bæði kann gagna okkum her búgva og øðrum økjum í heiminum.

Millum evnini, sum verða tikin upp til viðgerðar á námsskeiðnum eru t.d.: »Faroese waters in a global perspective«, »The Hydrography on the Faroe shelf«, »Validation of a 3-D model for the Faroe area«, »Krillbiology in the Faroe-Shetland Channel«, »Plankton on the Faroe shelf«, »Relationship between primary production, food abundance and fish production on Faroe plateau«, »Pelagic stocks in and migrating through the Faroese area«, »Seabirds and ecosystem modelling of Faroese waters«, »Marine Mammals in Faroese waters«, »Climate, climate change and the marine ecosystem in the Atlantic-Artic region«, »Possible environmental influences on the cod stock at the Faroe Islands and a comparison with other North Atlantic Stocks« oa.

Millum fyrilestrarhaldarnar kunnu nevnast: Bogi Hansen, Karin M. Larsen, Hjálmar Hátún, Knud Simonsen, Høgni Debes, Eilif Gaard, Jákup Reinert, Petur Steingrund, Jan Sørensen, Bergur Olsen, Dorete Block, Bjarni Mikkelsen, Ken Dringwater, Egil Sakshaug, Francois Carlotti, Wolfgang Fennel, Helge Drange, Villie Christensen og Jake Rice.



*Frá námsskeiðnum um gransking av føroyska havumhvørvinum á Sjómansskúlanum.*
*Mynd Jens K. Vang*

ítróttur

Nr. 183 • mikudagur • 25. september 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Ion helst til B36

**Formaðurin í felagnum sigur einki vera avgjørt, men**

B36-VENJARIN
*Jákup Mørk*



*Væl vitandi keldur siga seg vita, Ion Geolgau er væl áleiðis at skriva sáttmála við B36*

Í blaðnum í gjár skrivaðu vit, at HB eftir øllum at døma hevur loyst venjaraspurningin fyri komandi ár, og nú tykist eisini sannlíkt, at grannarnir úr B36 hava fingið sín venjara upp á pláss.

Talan skal í so fall vera um Ion Geolgau, sum frá 1998 til 12. umfar í ár hevur verið venjari hjá HB. Eftir 12. umfar – sum var móti júst B36 – gjørdi leiðslan í HB av at koyra rumenan úr venjarastarvinum.

## Onga viðmerking

Formaðurin í B36, Kristian á Neystabø, hevur ongan hug at gera nakrar viðmerkingar til tíðindini, og til venjaraspurningin yvirhøvur.

- Hatta havi eg onga viðmerking til. Støðan hjá okkum er óbroytt. Tað vil siga, at venjaraspurningurin ikki er avkláraður, eru einastu viðmerkingarnir, sum formaðurin hevur til tíðindini.

Sosialurin hevur tó frá væl vitandi keldum fingið at vita, at B36 og rumenski venjarin eru komin meira enn væl áleiðis í einari bindandi avtalu, og hetta er eisini væl í tráð við tað, sum Ion áður hevur sagt.

## Bara tríggir møguleikar

Í viðtali við Sosialin tann 20. august segði Ion Geolgau fyrst og fremst, at hann og konan í sínari høvdu gjørt av, at tey skuldu dvølja í Føroyum í nøkur ár, og at hetta framvegis var ætlanin.

Víðari segði venjarin tá eisini, at tað fyri seg hevði nógv at siga, at um hann skuldi verið venjari hjá øðrum føroyskum felagi, so var tað av avgerðandi týdningi fyri seg, at talan var um eitt felag við stórari ungdómsdeild, og hetta gevur helst í veruleikanum bara tríggjar møguleikar. Nevnliga NSÍ, KÍ og B36. Eisini hóast tað helst er so, at mest sum øll feløgini í bestu føroysku deildini hava spurt seg fyri hjá rumenanum.

Runavíkingar hava framvegis Jógvan Martin Olsen sum venjara komandi kappingarárið, og sum sæst aðra staðni í blaðnum, so verður tað neyvan til KÍ, at Ion fer, og so er helst bara ein møguleiki eftir.

Ein annar møguleiki er so sjálvandi eisini, at Ion verður verandi í Føroyum, uttan at hava nakað venjarastarv, men at ein slíkur maður skal kunna ganga leysur í Føroyum, tykist vera sera lítið sannlíkt.


## Starvsfólk til KT-deildina á Føroya Tele

"Loynidómurin at fáa tingini at eydnast er hart arbeiði – tí er tað ein loynidómur fyri tey flestu"
Mark Twain



Føroya Tele hevur seinastu árini støðugt víðkað um talið av tænastum, sum vit bjóða kundum okkara. Tað hevur ført við sær stóran vøkstur í fjøltættinum av uppgávunum á KT-deild okkara. Ein vøkstur, sum vit vænta heldur fram komandi árini.
Fyri framhaldandi at veita okkara starvsfólki á Føroya Tele bestu arbeiðsumstøður á KT-økinum, so at kundar okkara kunnu fáa bestu tænastuna, søkja vit eftir einum supportara til dagligu tænastuveitingina í fyritøkuni.

Arbeiðið umfatar:
· Uppseting og klárgering av teldum
· Uppsetan av prentarum
· Brúkarastuðul
· Backupp
· Uppfylgjing og skráseting av útgerð
· Annað fyrifallandi arbeiði á deildini

Viðkomandi skal hava góðar menniskjansligar eginleikar og skal kunna samstarva væl við brúkarar við sera ymiskum tørvi og fortreytum.

Royndir við einum ella fleiri av fylgjandi er ein fyrimunur:
· Windows NT 4.0 /Windows 2000/ Windows XP
· MS Office 2000, Pro

Føroya Tele skipar fyri neyðugum eftirútbúgvingum og skeiðum í Føroyum ella uttanlands.

Arbeiðsstaður er Føroya Tele í Tórshavn.

Starvið verður lønt eftir avtalu millum Starvsmannafelagið og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Lars Jensen (lj@ft.fo) á KT-deildini ella til Starvsfólkadeildina á tlf. 303030.

Umsóknir við avriti av prógvum og ummælum, skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mikudagin 9. oktober 2002 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

ella til ft@ft.fo

**Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt, og hetta setur stór krøv til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*